# Móttøka í býráðshúsinum

Almenn móttøka var í hølunum hjá Eysturkommunu við Gøtugjógv fríggjadagin 3. apríl.

Eysturkommuna er ein samanlegging av kommununum í Gøtu og Leirvík. Borgarstjóri er leirvíkingurin Jóhan Christiansen. Varaborgarstjóri er Frígerð Heinesen, fyrrverandi borgarstjóri í Leirvík.

Undir móttøkuni høvdu fólk høvi at hyggja seg um í húsinum og fáa eitt prát við politikarar og starvsfólk hjá kommununi.

Borgarstjórin flutti fram røðu og Dánjal Vang, varaborgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, bar eina heilsan fram vegna Fuglafjarðar kommunu.

Muntra í Fuglafirði tók sær av matinum, og blómuhandilin Orkis á Glyvrum lat prýði í sambandi við móttøkuna. Eisini varð nýggja búmerki hjá Eysturkommunu avdúkað undir móttøkuni.

*Myndir: Ruth Norðgerð Sevdal*




*Jóhan Christiansen borgarstjóri í Eysturkommunu*



*Dánjal Vang, varaborgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, bar eina heilsu fram vegna Fuglafjarðar kommunu*



*Jóhan Christinansen, borgarstjóri, Andreas Andreassen, tekninskur leiðari, Erik Lervig, kommunustjóri og Terji Lervig, formaður í tekniskunevnd*



*Børnini í frítíðaransingini í Gøtu høvdu gávu við*



*Starvsfólk hjá Eysturkommunu*



*Hanna Jensen, forkvinna í trivnaðarnevndini, systurin Paula Jespersen frá Salt, og Eiler Hansen frá Petur Pólsson, framførdu góðan sang*

# Kamping í Leirvík

**Á páskum verður kampingstevna í Leirvík. Arnhold Fjallstein, formaðurin í felagnum Camping. fo, sigur, at fullteknað er til stevnuna, sum verður við fótbóltsvøllin uppi á Brekkum**



Kampingfelagið Camping. fo skipar á páskum fyri kampingstevnu við fótbóltsvøllin uppi á Brekkum í Leirvík, har limirnir hava atgongd til fasilitetirnar í LIF-húsinum.

Byrjað verður mikudagin 8. apríl og verður til og við annan páskadag. 30 kampingvognar eru teknaðir til, og tað er ikki pláss fyri meira á parkeringsøkinum við fótbóltsvøllin, sigur Arnhold Fjallstein. Felagið hevur umleið 80 virknir limir.

**Diamantbrúdleyp**
14. apríl kunnu hjúnini Jona og Óli Chr. Danielsen í Saltangará halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni. Vinir og kenningar eru vælkomnin at heilsa uppá diamantbrúðarparið í heiminum 2. páskadag eftir kl. 18.

**Gullbrúdleyp**
29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

**80 ára føðingardagur**
12. apríl verður Niels Pauli Mortensen, vanliga nevndur Pallun, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Brúdleyp**
Mikudagin 8. apríl kl. 14 giftast í Ebenezer Ásvør Færø og Bjarni Jøkladal. Móttøka verður eftir vígsluna.Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19 í Studentaskúlanum í Hoydølum

**Brúdleyp**
8. apríl giftast í Keypmannahavn Stine Dobak Jensen, Oslo, og Tummas Planck Reinert, Tórshavn. Adressan er Øre sundsvej 92, 2 th., 2300 København S.

**Brúdleyp**
Mikudagin 8. apríl giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 16 Sigrid Mikkelsen og Niels Juel Arge. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

**Brúdleyp**
Langa fríggjadag 10. apríl giftast Rannvá Káradóttir Justinussen og Rúnar Reistrup, bæði úr Havn, í San Silvestro kirkjuni í Italia. Brúdleyp fyri innboðin verður á staðnum.

## Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jona Joensen**

doyði og varð jarðað.
Takk til tykkum, sum vóru við til jarðaferðina.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Eldrasambýlið oman Hoydalar.

*Familjunnar vegna*
**Jógvan og Sanna**
**Hervør og Jógvan**
**og langommubørn**

## Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða dóttir, systir, fastir og svigarinna

**Nina Magnussen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til bindiklubban og øll tit onnur, sum hjálptu við til jarðaferðina og í ervinum.
Tøkk øll tit, sum fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað og serliga tøkk til tykkum, sum komu tann langa veg úr Føroyum at fylgja.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.

*Familjunnar vegna*
**Kirsten, Diaba, Kulli, Thea, Andreas, Jarleivur og Kristian**